# HEILSANIR



**Góði elskaði abbi og Rannvá**
Hjartaliga tillukku við 75 og 30 ára føðingardøgunum. Alt gott í framtíðini.
**Allarbestu heilsanir Herdis og Torkil**



**Góða Kristina og Jonna**
Hjartaliga tillukku við 5 og 30 ára døgunum 17. august.
**Heilsan babba**



**Góða elskaða mamma og omma**
Lukku og gleði á tínum 90 ára degi 18. august, og takk fyri alt tú er fyri okkum. Bestu ynskir fyri framtíðina.
**Ynskja vit í Kovalág 3**

## FØÐINGAR

Sarita Sofía Nielsen og Martin Domino hava fingið ein son. Hann var 50,5 cm. og vigaði 3455 gr.

4. august fingu Súsanna Køtlum og Darlington Akpotene, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3450 gr.

6. august fingu Heidi og Bog Næs, Hvalba, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3950 gr.

7. august fingu Leigh og Jan Hjaltalin, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3900 gr.

7. august fingu Poula úr Gørðum og Alexander Jespersen, Skopun, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3555 gr.

9. august fingu Maria Bovbjerg og Fróði Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3600 gr.

10. august fingu Súsanna Sondum og Oddur F. Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 4720 gr.

10. august fingu Sonja og Allan Norðgerð, Leirvík, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3750 gr.

11. august fingu Anita í Dali og Sigmund Sørensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3725 gr.

11. august fingu Anna og Joen David Norðoy, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3800 gr.

13. august fingu Annika Vilhelm og Tummas Andreassen, Kunoy, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3200 gr.

13. august fingu Sólvá Eystberg og Geir Wardum, Klaksvík, ein son. Hann var 61 cm. og vigaði 4900 gr.

14. august fingu Aslaug Jensen og Rúni Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. og vigaði 2900 gr.

14. august fingu Inna Sigvardsen og Petur Elias Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3800 gr.

## ANDLÁT

**07. august**
Nicodemus Rasmussen, vanliga nevndur Demmus uppi í Gerði, av Strondum, 90 ár.

**08. august**
Poula Sólrun Toftum, fødd Vestueið, í Vági, 60 ár.

**09. august**
Jutina Vilhelm í Vági 81 ár.

**10. august**
Elsebeth Malena Rasmussen, Argir, Elspelena, 76 ár.

**11. august**
Jóhannus Jacobsen, inni í Rók, Saltnes, 92 ár.
Hjalti Hjaltason, Skála, 69 ár.
Jógvan Olsen, Toftir, 52 ár

**12. august**
Palma Jensen á Tvøryri, 84 ár.

**14. august**
Maria Jespersen, fødd Petersen, ættað úr Tórshavn, bús. Hirtshals, 77 ár

## 90 ÁR

Í dag, 17. august verður Hans Jacob Justesen, Klaksvík, 90 ár. Dagurin verður hildin á Sjómansskúlanum frá kl. 18.00.

## 80 ÁR

Sunnudagin 18. august fyllir Tolina Højgaard, Vestmanna, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum Hans Højgaard, Marinargøta 28, 188 Hoyvík frá kl. 16.00.

# TILTØK

**Gudstænastur**
**12. sunnud. e. trinitatis**
*Havnar kirkja:* Sonja Klein
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
*Kvívík:* kl. 12, altar.g, Marjun Bæk
*Haldarsvík:* kl. 11 altarg., Povl Bendix Knudsen
*Gjógv:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Norðskála:* kl. 17 altarg., Peter O. K. Olofson, kirkjukaffi aftaná
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Elduvík:* kl. 12, altarg.,
*Hellurnar:* kl. 17, altarg., Uni Næs
*Svínoy:* kl. 12 altarg., Elsa Funding
*Sandavágur:* kl. 11 altarg., David Johannesen
*Skopun:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Hvalba:* kl. 12.30 Ólavur Rasmussen
*Sandvík:* kl. 14 Ólavur Rasmussen
*Fámjin:* kl. 12 altarg., talvan gongur fyri sjómansmissiónina
*Øravík:* kl. 17 altarg., Jónsvein Bech
*Vágur:* kl. 11 altarg., Marianne Telling

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, kl. 18 Evangelisku fundirnir sunnukvøldið byrja aftur.
Sunnudagsskúlin byrjar 25. august.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, Palli Petersen talar. Kl. 18 Møti, Niels Edvard Olsen talar. Øll eru vælkomin.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa og barnadópur v/ Jacques Adams í Mariukirkjuni.
Aftaná verður kirkjukaffi.

**Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og Juniormøti.

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Snorra Brend.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 18 Evangeliskt møti, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Jastrid og Paula Høj, kl. 18 Kvøldmøti við Regin við Skipá.
Mánakv. kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara:
www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagssskúli, kl. 17 Møti.

**Konfirmatión í Havnar kirkju**
Heystkonfirmatiónirnar 2002 verða 6. oktober og 13. oktober. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju mikudagin 21. august kl. 15.00. Markið millum Suðurstreymoyar eystara og vestara prestagjald er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

**Heimamissiónin**
hevur útimøti leygardagin í Saksun kl. 17 og í Hvalvík kl. 19.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Anju og fleiri.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jan og Elsebet.
Bønarmøti hvørt mánakvøld kl. 20-21.
Tú ert vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Onki møti verður sunnudagin vegna legu.

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Johan Thomasen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti við Glasstovuna á Tvøroyri um viðrar.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur, um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 18. august verður farið niðan á Slættaratind. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 9.30. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Túrurin er miðal tungur. Tilmelding.

**Eldrafelagið Nón: ÚTFERÐ**
Vit fara útferð til Elduvíkar sunnudagin 25. aug. Farið verður frá Sjómansheiminum í Runavík kl. 11.00.
Eisini gera vit ein túr til Sands 30.8. til 1.9. Nærri boð ring 447718 ella 447242 áðrenn týsdagin 20.8.
*Eldrafelagið Nón*

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.



# TILTØK

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
*Mánadagin 19. august:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døugrðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 20. august:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Smáar gerandislýsingar fyri 600 árum síðani og frameftir. Ásmundur V. Johannesen
*Mikudagin 21. august:*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 22. august:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 23. august:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
**Í august er skrivstovan bert opin mikudagar frá kl. 16-18.**
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Opið verður aftur týsdagin 20. august 2002.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 17. august: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnudagin 18. august: Tlf. 441490

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## BRÚDLEYP

Í dag, leygardagin kl. 14.00 giftast í Saron á Viðareiði Monica Kunoy Høgnesen, Klaksvík og Timothy Sharp, USA. Móttøka verður aftaná vígsluna, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, leygardagin kl. 14.00 giftast í Viby Kirke Elin Suzann Lassen úr Havn og Bennie Gandry Andersen úr Århus. Brúdleypið verður hildið á Tranbjærg Kro, Hovedgaden 37, DK-8310 Tranbjerg-Århus.

Í dag, leygardagin kl. 15.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Simona Blábjørg, Fuglafjørður og Jóannes Poulsen, Lamba. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Í dag, leygardagin kl. 15.00 giftast í Dragør kirkju Randi Hansen Dall, dóttir Jenny Hansen Dall sálu, Klaksvík og Kim Beinthin, Dragør. Adr.: Stationsvej 4, tv, 2791 Dragør.

Í dag, leygardagin kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Hanna Vágsheyg og Birgir Ingolf Sigurðsson, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður hildin í Skálanum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Í dag, kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Sólheim, Saltangará og Egon Jeonsen, Sandavágur. Brúdleypsadressan er HB-húsið.

Leygardagin 24. august giftast í Elim í Søldarfirði Joan Miðberg, Saltangará og Eddie Mikkelsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 448695 ella 441130 innan 17. august.

Leygardagin 24. august kl. 13.00 giftast í Býráðssalinum í Klaksvík Osla Jacobsen og Jan Joensen, bæði úr Klaksvík. Tey, ið vilja heilsa uppá brúðarparið eru vælkomin í húsið hjá húsmøðrunum í Bøgøtu frá kl. 18.00.

Leygardagin 31. august kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Maiken Sundsskarð og Leif Hjørleifsson Waag Høgnesen, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkoma verður á Mylnugøta 13 kl. 20.00.

Leygardagin 31. august kl. 17.00 giftast Jonna í Nýggjustovu, Sørvágur og Óla Jákup Lindberg, Trongisvágur. Veitslan verður fyri innbodnum.

Leygardagin 7. september kl. 16.00 giftast í Norðskála kirkju Jonna Dahl og Heðin Debes, Oyri. Veitslan verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 422734, 422234 ella 422220 í seinasta lagi 21. august.

Leygardagin 7. september kl. 14.00 giftast í Hebron í Leirvík, Hjørdis Janusardóttir Jacobsen, Klaksvík og Holgar Johannesen, Leirvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 220787, 256894 ella 456594, áðrenn 27. august.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 2. sept. hava Petur og Andrea Kruse, Eiði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í EB-húsinum leygardagin 14. sept. kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 423281 ella 313842 áðrenn 1. sept.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Eg komi skjótt; halt tí fast, sum tú hevur, fyri at eingin skal taka krúnu tína«.*
*Op.3,11.*

Tey eru ikki mong, sum verða fødd til at bera ein kongakrúnu. Men nú er tað ikki bara kongakrúnan, sum telur. Krúnurnar kunnu í aðramátar vera so mangar og ymiskar. Vit liva í einum samfelag, har ídni og framburður og tey stóru avrikini verða sett hátt. Menniskju verða mangan mett eftir, hvaqt tey kunnu avrika í arbeiði, ítrótti og øðrum. Tess størri dugnasemi og ídni tú kanst vísa, tess hægri upp kemur tú á samfelagsstiganum. Krúnan á verkinum er ofta hægri og betri lívskor.

»Halt tí fast, sum tú hevur..«. Tað, vit í hesum sambandi mega halda fast við, er tað, sum vit hava eftir, tá alt annað fer. Her verður ikki fyrst av øllum hugsa um tímiligar lutir. Ein og hvør lutur hevur jú sína tíð. Og hóast teir tímiligu lutirnir eru okkum kærkomnir og eisini neyðugir, so stendur lívi ikki í tí, sum tú eigur. Tað kemur ein løta í lívinum, tá vit skulu vera til reiðar at sleppa øllum veraldar krúnum.

Men í øllum, sum broytist og fer í okkara heimi, hevur Gud givið okkum hann, sum vit trygt kunnu halda fast við bæði í lívi og deyða, Jesus Kristus. Hansara heiðurskrúna var ein tornakrúna og heiðurssæti ein krossur. Haðani ljóðar boðskapurin: uttan kross eingin krúna.

Men hví leita til Jesu kross, um tú kanst vinna lívið við dugnasemi, ídni og peningi, kann vera spurt. Júst her kemur boðskapurin okkum øllum á møti. Við Jesu kross savnar Gud alla mannaættina og rættir okkum lívsins krúnu, hana sum eingin og einki kann taka frá okkum. Við sínum deyða og uppreisn hevur Jesus vunnið okkum fyrgeving syndanna og ævigt lív. Og heldur tú fast í gleðiboðskapinum um Kristus, kemur tú at uppliva, at HANN heldur fast, okkara frelsari og harri, Jesus Kristus.

**Inga Poulsen Dam, prestur**